# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nýggjur og lættari Mazda2

**Tað er ikki uttan orsøk, at Mazda2 er kosin »Årets Bil i Danmark 2008« og varð nummar tvey í kappingini um ársins bil í Evropa. Talan er um eitt nýtt konsept við løttum, tryggum og umhvørvisvinarligum bilum, sum eru ein uppliving at koyra**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Mazda2 er designaður í sama væl umtókta »zoom-zoom« stílinum, sum byrjaði við Mazda6 í 2002, og síðan komu t.d. Mazda3, Mazda5 og CX-7 í sama stíli. Hesin Mazda2 hevur einki við forgangaran at gera. Tað einasta teir hava til felags er navnið og støddin, sum er áleið tann sama. Talan er um ein nýggjan bil frá topp til tá.

Meðan tann fyrri Mazda2, sum varð gjørdur í Valencia í Spania, var ein bilur til tey meira tilkomnu, vendir hesin nýggi japanski Mazda2 sær serliga til unga ættarliðið. Mazda2 er ein sportligur hatchback við 5 hurðum, sum verður er teknaður og framleiddur hjá Mazda í Hiroshima.

Motorjournalistar eru samdir um, at Mazda við hesum bilunum skriva søgu, við tað at teir hava vent skeivu gongdini, har hvørja ferð ein nýggjur bilur kemur á marknaðin, er hann størri og vigar meira enn forgangarin. Mazda konstruktørarnir settu sær tí fyri at gera ein lættari bil, og tað hevur eydnast teimum at gera Mazda2 millum 100 og 200 kg lættari enn kappingarneytarnir. Hetta fyri at gera bilin meira orkusparandi, umhvørvisvinarligan og lættan at umgangast í ferðsluni.

## Lættur og tryggur

Hóast bilurin er lættur og økonomiskur er ikki spart upp á ljóðdoyving og trygd. Umframt allar tær vanligu innbygdu trygdarskipanirnar sum t.d. ABS (blokeringsfríar bremsur) við EBD (elektroniskan bremsukraftdeilara), EBA (neyðbremsu assistent) og DSC (Dynamic Stability Control), hevur Mazda2 eisini MAIDAS (Mazda Advanced Impact Distribution and Absorption System) sum effektivt »absorberar« og deilir kollisiónskraftina við ein samanstoyt. Hetta fyri at verja tey ferðandi í bilinum best møguligt.

Hvat koyrieginleikum viðvíkur virkar Mazda2 sum ein størri bilur at koyra. Hann hevur gott vegfesti og er fullkomiliga tryggur at koyra við gjøgnum sving við ferð.

Mazda2 fæst í útgávunum: Go, Advance, Advance+ og Sport, og við tveimum 1,3 litra motorum við ávikavist 75 og 86 hk og einum 1,5-litra motori við 103 hk.

Bíligasti Mazda2 Go (75 hk) kostar kr. 159.000 og tann dýrasti 1,5 Sport (103 hk) kostar kr. 189.000. Mazda2 kann síggjast og roynast hjá Bilasøluni í Hoyvík.




*Ársins bilur í Danmark 2008. Her er Mazda2 í sport útgávuni*



*Mazda2 innan. Instrumentborðið er einfalt, ergonomiskt og smart designað*

## MAZDA2 1,3 Advance

| | |
|---|---|
| Motorur | 1,3 litra bensin 86 hk |
| 0-100 km/t | 12,9 sek |
| Snún. moment | 122 Nm v. 3500 snún/min |
| Bensinnýtsla | 18,5 (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 185/55-15 |
| **Stødd og vekt:** | |
| Longd | 88,5 cm |
| Breidd | 169,5 cm |
| Hædd | 147,5 cm |
| Vekt | 960 kg |
| Viðførisrúm | 250 litrar |
| **Prísur:** | kr. 169.000 v. aircondition (metallakk + kr. 4.000) |
| **Søluumboð:** | Bilasølan<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 359700<br>www.bilasolan.fo |






*Bilurin er designaður í nýggja »zoom-zoom« stílinum hjá Mazda*